# Katastrofalt



Rógvi Jacobsen er vanliga eitt av dyggastu álitunum á HB-liðnum, men eins og hinir á liðnum mátti hann ásanna, at hetta ikki var teirra dagur.

– Teir vóru bara nógv meira klárir til dystin, enn vit vóru. Ikki tí vit undirmettu teir, tí vit hava jú í steypakappingini leikt tveir tættar dystir móti teimum, men tað gekk bara ikki hjá okkum.

– Serliga á miðvøllinum høvdu vit ilt við at finna hvønn annan, og eftir at teir skora, tora vit als ikki at spæla.

– Alt í alt, so haldi eg, at hatta var ein katastrofal byrjan hjá okkum. Tað ger tað óneyðuga tungt, men vit bara royna at koma víðari. Enn eru so 17 umfør eftir, helt Rógvi Jacobsen, tá vit fingu orðið á hann eftir dystin.

-jm

# Málið er óbroytt



Var lagið ringt í HB-leguni eftir dystin, so var rómurin í skiftingarrúminum hjá Skála øgiligur.

Ikki minst mundi gleðin vera serliga stór um, at sigurin var meira uppiborin enn heppin, og júst hetta tóktist miðvallarskiparin hjá liðnum, Pauli G. Hansen, eisini at fegnast um eftir dystin.

– Vit hava vant nógv við at lata bóltin koyra á liðnum, og tað haldi eg gekk væl í dag.

– Kanska var veðrið eisini til fyrimuns fyri okkum, men eg haldi meg tosa fyri allar, tá eg sigi, at vit trúu upp á uppgávuna. Tað má man sjálvandi altíð gera, hóast tað ikki altíð riggar, men í dag riggaði tað so.

Sjálvur hevði Pauli eisini eina perlu av einum máli, og eftir dystin mátti hann ásanna, at hann hevði rakt leðurkúluna óvanliga væl.

– Tað er so ikki hvønn dag, at eg raki bóltin somikið væl. Har var nakað av vindi, so eg helt tað var bara at royna, og eg fái so ikki sagt annað, enn at eg rakti hann væl.

*Og nú eru tit eisini fremstir í deildini. Er tað nakað, sum tit ætla at venja tykkum við?*

– Tað hevði nú ikki verið so galið, men málið hjá okkum er framvegis tað sama. Fyrst og fremst at halda okkum omanfyri strikuna, og síðani at ota okkum upp móti miðjuni, helt altso Pauli G. Hansen at enda.

Skála-HB 3-1 (2-0):

# Sensatión á Skála

**Púrasta óvæntað - men fult uppiborið - vann Skála ein uppibornan 3-1 sigur á føroyameistarunum úr HB, tá hol varð sett á fótbóltslandskappingina mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Illa skipaða HB-spælið hevði við sær, at Skála sjáldan hevði trupulleikar við at spæla seg úr trupulleikunum*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tey bæði árini, sum Skála higartil hevur verið í bestu deildini, hava teir bíða leingi eftir fyrsta sigrinum. Fyrsta árið var liðið framvegis sigursleyst undan teimum trimum seinastu umførunum, men við trimum sigrum á rað fingu teir kortini lyft seg upp um niðurflytingarstrikuna.

Í fjør var bíðitíðin tó stytt niður til níggju umfør, áðrenn teir aftur máttu bíða til seinastu tríggjar dystirnar, sum enn einaferð bjargaðu liðnum.

Nú er tó vent í holuni. Skála vann nevnliga longu í fyrstu royndini í ár, og soleiðis kunnu teir í øllum førum fram til sunnudagin smyrja seg við heitinum sum einsamalt oddalið.

At sigurin so eisini var á føroyameistarunum úr HB, man ikki gera smakkin á Skála verri. Og hóast talan var um ein óvæntaðan sigur, so var hann fult uppiborin.

### Vindur á Skála

Veðrið var ikki nakað serligt mikukvøldið, og tað er einki at taka seg aftur í, at nógvi vindurin darvaði gestunum meira enn heimaliðnum.

Og vindurin átti eisini sín stóra leiklut í, at Skála longu eftir fáum minuttum legði grundarlag undir sensatiónini, tá Bárður Danielsen skoraði úr 40 metrum.

Og so var tað av álvara, at munur kom í dystin. Eitt er, at vindurin kanska darvaði spælinum nakað, men soleiðis sum leikur gekk fyri seg, so skuldu tað helst verið gestirnir, sum vóru fegnari um hetta, tí annars hevði vandi verið fyri, at leiðslan í hálvleikinum hevði verið væl meira enn tey bæði málini, sum Skála fekk fyri steðgin.

### Óskipað HB-spæl

Ikki minst var tað hugvekjandi at síggja, hvussu stórur munurin var í skipanini av spælinum hjá báðum liðunum. Ein av heilt avgjørdu styrkjunum hjá HB hesi bæði gulláríni hevur verið, at liðið í at kalla øllum lutum hevur verið betri skipað enn mótstøðuliðið, men soleiðis var ikki á Skála.

Serstakliga hevði HB alstórar trupulleikar á miðvøllinum. Ein miðvøllur, sum við Kára Nielsen, Rúni Nolsøe, Martin Christensen og Rógva Jacobsen átti at verið tann kanska sterkasti í landinum. Her eydnaðist liðnum hvørki at halda breidd ella djúpd í hvørki spæli ella trýsti, og tað lætti munandi um umstøðurnar hjá Skála at spæla.

Teir fingu við hesum oftani lætt spæl, tá HB-álopini skuldu haldast í skák, og í veruleikanum hevði HB bert eitt veruligt álop fyri steðgin, tá Heine Fernandez mátti síggja sín stútara verða bjargaðan av einum væl spælandi Igor Bjarni Kostic í Skálamálinum.

Men kanska enn týdningarmiklari var, at Skála sjáldan hevði nakrar trupulleikar við at spæla sær undan HB-trýstinum. Serliga var tað her ein trupulleiki fyri HB, at Rógvi alla tíðina søkti inn móti miðjuni, og tí var tað mest sum hvørja ferð nóg mikið hjá Skála at skifta móti høgru, fyri at sleppa undan trýstinum.

### Eyðkendur stílur

Og so skal tað heldur ikki forsmáast, at Johan Nielsen nú í eitt ár hevur havt ábyrgdina av Skála. Væl skipað spæl í bæði álopi og verju hevur altíð verið vørumerki hansara, og í flytingunum á vøllinum sást nakað av tí aftur, sum í 90'unum gjørdu GÍ til sterkasta liðið í landinum. Við at skjóta breiddina á miðvøllinum, varð pláss ofta skapt til álop upp gjøgnum síðurnar, og tá HB nú hevur skift landsins tryggastu miðverju út við eina sera unga av slagnum, so kundi tað nærum ikki ganga væl.

Og tað gjørdi tað so ikki. Pauli G. Hansen økti til 2-0 við brakandi langskoti, og tó at HB var nær við í onkrari frísparksroynd, so tóktist Skála væl og virðiliga at standa mát eftir steðgin. Ikki minst tí venjarin hevði sent teir langt fram á vøllin at trýsta ímóti vindinum, heldur enn at pakka seg niður í egnum brotsteigi við eftirfylgjandi vanda fyri trunkaspælið í trý korter.

Seinastu 20 min. eydnaðist tó HB at skapa eitt trýst. Skála hevði nú kanska eisini mist luftina, og tá Heine Fernandez minkaði eftir óbeinleiðis fríspark, fór av álvara at standa á.

Fleiri ferðir spurdust eisini vandastøður í Skálabrotsteiginum av hesum, men málið kom ikki, og so hendi tað, sum so ofta hendir í slíkum førum. HB tveitti í yvirtíðini alt fram, og so fekk Skála sparka bóltin fram til kvika Jonhard Frederiksberg. Hann rann seinasta HB'aran av, og tá hann so sendi millum beinini á Pól N. Joensen, tók fagnaðurin kring vøllin ongan enda. Skála er oddalið í bestu deildini, og sjálvt um tað kanska ikki heldur alt árið, so kann eingin taka gleðina um støðuna her og nú frá teimum.

## Dysturin í tølum

**Skála-HB 3-1 (2-0)**
1-0: Bárður Danielsen, 13
2-0: Pauli G. Hansen, 28
2-1: Heine Fernandez, 77
3-1: Jónhard Frederiksberg, 90

**Skála:** Igor Bjarni Kostic – Bárður Danielsen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu – Hanus Thorleifsson, Pauli G. Hansen, Nenad Stankovic, Alexandur Johansen (Rúni Rasmussen, 78.) - Jónhard Frederiksberg, Eugen Marian Stanciu (Bogi Gregersen, 78.)
**HB:** Pól N. Joensen – Hallur Danielsen (Hendrik Rubeksen, 82.), Rasmus Nolsøe (Rókur av Fløtum Jespersen 65.), Vagnur M. Mortensen, Janus M. Joensen – Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Martin Christensen, Rógvi Jacobsen – Heine Fernandez, Heðin á Lakjuni
**Gul Kort:**
**Skála:** Dusan Jaic, 36., Iulian Florescu, 82.
**HB:** Rasmuse Nolsøe, 55., Heine Fernandez, 63.
**Dómari:** Suni Johansen. Kom sera væl frá uppgávuni. Ikki minst, tá hugsað verður um, at vit enn eru komin so stutt ávegis í kappingarárinum.



# Kvinnulandsliðið fór avstað

**Føroysku hondbóltskvinnurnar fóru hósdagin til Danmarkar, har tær fram til týsdagin fara at fyrireika seg til Italiu-ferðina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Annika Ljósstein sigur seg at kalla einki kenna til hini liðini í kappingini, men bæði hon og liðfelagarnir tykjast tó sera uppsettar til ferðina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Challenge-Trophy kappingin, sum í ár verður hildin í Italia, byrjar mikudagin, og beint undan fráferðini hevði hondbóltslandsliðið tíðindafund á Sunset Boulevard, sum eisini er høvuðsstuðul hjá liðnum.

### Fimm dagar til fimm dystir

Og eingin ivi er um, at kvinnurnar veruliga sleppa at royna seg ferðini. Teir fimm dagarnar, sum kappingin varar, skulu tær spæla fimm dystir, og bara tað í sjálvum sær er helst ein sera stórur biti hjá leikarum, sum eru vanar við ein og tveir dystir um vikuna.

Umframt Føroyar eru londini í okkara bólki Ísrael, Letland og Belgia, og fyrstu tríggjar dagarnar er so talan um dyst móti hesum londum.

Síðani veðrur leikt um plaseringarnar á tann hátt, at tey bæði fremstu liðini í hvørjum bólki spæla hálvfinalu, og síðani verður talan sjálvsagt um finalu og bronsudyst.

Tey bæði niðastu liðini í bólkinum spæla so eisini dystir sínamillum, fyri síðani at lata vinnararnar av hesum dystum spæla um 5/6 plássið, meðan tapararnir spæla um 7/8 plássið.

Vit fingu okkum eisini eitt prát við Anniku Ljósstein, sum er ein av leikarunum á føroyska liðnum, og tó at hon ikki kennir so nógv til komandi mótstøðuliðini, so duldi hon ikki fyri, at tað er við spenningi, at tær fara undir uppgávuna.

– Vit vita snøgt sagt einki um hini liðini, so tað er trupult at gera sær nakra fatan av, hvat mál vit skulu seta okkum. Vit hava roynt at leita á alnetinum og aðrastaðni, men tað einasta, sum vit hava funnið, eru liðmyndir av ymsu liðunum, so vit vita, hvussu troyggjurnar síggja út. Og so tykist tað eisini, sum um talan er um rættiliga ung lið. Fyri tey flestu er í øllum førum galdandi, at talan er um leikarar, sum eru føddar í 80'unum, men nógv meira enn tað vita vit so ikki.

– Men vit eru so samdar um, at vit skulu gera okkara allarbesta. Fyrst og fremst ræður tað um at stríðast av øllum alvi, so úrslitið gerst tað best møguliga, og so kunnu vit eisini troysta okkum við, at hini londini neyvan heldur vita tað heilt stóra um okkum.

### Kontra

Spurd, hvørt tær eisini hava gjørt sær nakrar tankar um, hvussu spælistílurin hjá liðnum skal vera, sigur Annika, at tað hava tær eina heilt greiða fatan av.

– Vit eru sera fáar á liðnum, sum eru veruligir bakspælarar, so tað nógva av álopsspælinum má koyra yvir vengurnar. Her haldi eg eisini, at vit hava nakrar sera kvikar og rennisterkar leikarar, so tað verður við denti á eina sterka verju og kontraspæl, at okkara spæl skal koyra.

Og við fimm dystum upp á fimm dagar ræður kanska eisini um at spara upp á ymsu leikararnar?

– Sjálvandi. Tað er so nakað, sum vit ikki hava roynt fyrr. Vit hava vant sera nógv og hart síðani landskappingin endaði, so vit halda okkum hava fyrireikað okkum best møguligt, men tað verður ongantíð tað sama, sum at spæla dystir. Tá rokni eg veruliga við, at tað fer at merkjast í hvørjum einasta vødda í kroppinum, men tað mugu vit so bara taka við. Spennandi verður tað so undir øllum umstøðum, heldur Annika Ljósstein at enda.

# FCK og Brøndby stevna ímóti finaluni

**Leikluturin hjá Toda Jónsson gjørdist ikki stórur, tá ið FCK á heimavølli tók risafet ímóti steypafinaluni, sum verður Kristi himmalferðardag**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Tað skal spælast tvær ferðir trý korter um fjúrtan dagar. Bæði í Aalborg og í Odense. Tað er framvegis møguleiki fyri, at heimaliðini í aðru viku - AaB og OB - fara at røkka finaluni. Eftir fyrru hálvfinalurnar, sum vórðu spældar mikukvøldið, bendir kortini nógv á, at tað fara at verða tvey tey størstu og hesi seinastu árini mest vinnandi feløgini í Danmark, sum Kristi himmalferðardag í Parkini fara at hittast í steypafinaluni.

Brøndby megnaði ikki at vinna á heimavølli. Tað var eitt væl lakari úrslit, enn tað var sunnudagin, tá ið teir á heimavølli vunnu 4-0 ímóti AaB. AaB var aftur hesa ferð mótstøðuliðið, men úrslitið gjørdist eitt heilt annað.

Kortini er tað mest sannlíkt, at Brøndby fer at vinna plássið í hálvfinaluni, tá ið liðini hittast aftur í Aalborg. Brøndby var støðugt omaná mikukvøldið. Eisini í 2. hálvleiki, tá ið teir vóru undirmannaðir. Liðformaðurin og verjuálitið, Per Nielsen, varð dygst undan steðginum rikin av vøllinum. Dómarin vísti honum reyða kortið, tí hann hevði hevnt seg ímóti AaB álopsspælaranum, David Nielsen, sum hann bæði sunnudagin og allan 1. hálvleik mikukvøldið hevði havt fleiri samanbrestir við. At David Nielsen, sum er fyrrverandi liðfelagi hjá Toda Jónsson í FCK, ikki er populerur í Brøndby hoyrdist alla tíðina, og serliga í 2. hálvleiki góvu áskoðararnir til kennar, hvussu lítið teir hildu um kropssterka mannin.

Í Danmark verður mett, at Brøndby fer at megna at skjóta mál á útivølli. Tað plaga teir altíð at gera. Um teir fara at megna tað, so verður neyðugt hjá AaB at vinna. Avrikini sunnudagin og mikukvøldið bendu ikki á, at teir verða førir fyri tí.

### Góður hugburður

FCK venjarin, Hans Backe, hevði mánadagin kravt av sínum spælarum, at teir í hálvfinaluni mikukvøldið vístu heilt øðrvísi hugburð, enn teir gjørdu í 2. hálvleiki ímóti AB sunnudagin. Um dysturin endar 3-3, og spælararnir hjá mær hava arbeitt tað, sum tað eigur at verða roknað við, at teir megna, so verði eg betri nøgdur, enn um teir vinna og ikki hava víst tann hugburðin, sum teir eiga at gera, segði venjarin.

FCK vann 3-1, og teir arbeiddu við lív og sál ímóti OB, sum ikki var komið í Parkini fyri at goyma seg í og kring egnan brotsteig.

Tað vóru verjuspælararnir hjá FCK, sum vóru í miðdeplinum. Vongverjin í høgr, Ole Tobiasen, fekk brotsspark, tá ið vísarin hevði verið hálva aðru ferð runt. Fyri triðju ferð á rað var tað Álvaro Santos, sum fekk fulla úrtøku úr ellivu metrum. Dygst undan steðginum javnaði Miti. Hetta var avgjørt ikki sambært spælbýtinum. Eftir steðgin økti vongverjin í vinstru, Peter Christiansen, sum varð skiftur inn eftir 1. hálvleik. Síðsta málið skoraði fyrrverandi OB spælarin, Lars Jacobsen, av brotsteigarmarkingum í vinstru og í sonnum Henry stíli. Eftir steðgin varð hann fluttur av vongverjanum og fram á miðvøllin.

### Todi bíðaði leingi

Álvaro Santos og Jesper Bech vóru í FCK álopinum. Serliga Jesper Bech tiltuskaði sær onkrar møguleikar, uttan at tað eydnaðist honum at fáa mál. Todi Jónsson kom á vøllin fyri Hjalte Bo Nørregaard, tá ið tað restaðu sjey minuttir. Eina ferð átti Todi at havt fingið møguleikan. Hann spurtaði frá verjuni, men Jesper Bech valdi at royna úr tjúgu metrum heldur enn at stinga fram ímillum.

Sunnudagin fer FCK at spæla á heimavølli ímóti Herfølge. Tá verður Álvaro Santos leikbannaður. Tí kann roknast við, at Todi fer at fáa størri leiklut, enn hann hevði mikukvøldið.

– Eg hevði roknað við at byrja á beinkinum, og eg haldi, at vit hava góða útgangsstøðu undan seinnu hálvfinaluni, sigur Todi Jónsson á heimasíðu síni.

## Landsliðshópurin

**Málverjar**
Helena Dam Poulsen
Tomma Petersen
Fríða Petersen

**Útileikarar**
Nicolina Eyðbjørnsdóttir
Anna Kristina Samson
Anna Mari Káradóttir
Katrin á Neystabø
Annika Ljósstein
Joan M. Djordjevic
Simona Hansen
Gurið Mortensen
Bára Skaale Klakstein
Lív Sørensen
Una Olsen
Gunnleyg Berg
Heidi Maria Akselsen

**Venjarar:** Svein Rógvi Nielsen & Flemming Raben